


## PARTABRØVINI HÆKKA

Partabrøv sum hava verið undir stórum trýsti síðan seinastu viku í juli orsakað av láni– og bústaðarkreppuni í USA, eru nú hækkaði umleið 4,5% aftur í góða viku. Góða rákið varð staðfest fríggjadagin, tá lyklatøl um amerikanska húsamarknaðin og bíleggingar til virkir gjørdust betri enn væntað. Friður sýnist at valda í fyrstu atløgu, men hóast partabrævakursirnir eru hækkaðir støðugt, er enn ov tíðliga at siga um korrektionin er av á hesum sinni. Til tess krevst at partabrøv hækka minst 4% aftrat. Tó kann væntast, at berast ófrættatíðindir um láni– og bústaðarkreppuna aftur, kunnu marknaðirnar gerast ótryggir aftur og partabrøv kunnu fara at lækka niður móti ráklinjuni frá 2003. Í sambandi við at FED lækkaði diskontorentuna, góvu teir greið tekin um, at tíðarskeiðið har prísvakstrarviðurskifti í mesta mun stýra rentuásetingini, nú er av og at FED ístaðin fer at halda eygu við búskaparvøkstrinum. Hetta merkir at vit í komandi tíðarskeiði fara at geva lyklatølum sum húsasølu, brúkaraáliti og nýtslu størri ans enn higartil.

## NORSKA KRÓNAN STERK

Norska krónan liggur enn beint undir 0,94. Hon er sostatt tætt við tað sterkasta í meir enn eitt ár. Hon er hækkað 7% síðan botnin fyri stívliga einum ári síðan.

## RENTURNAR ÓBROYTTAR

Lánsbrævarenturnar vóru stórt sæð óbroyttar í farnu viku. 10-ára rentan er 4,35%. Íleggjarar bíða eftir tíðindum, sum kunnu flyta marknaðin aftur.

## HESA VIKUNA

Av hendingum hesa vikuna sum kunnu ávirka marknaðirnar, er serliga røðan hjá FED stjóranum Bernanke fríggjadagin, har hann fer at røða um húsamarknaðin og pengapolitikk. Íleggjarar fara at lurta eftir um nakað nýtt verður sagt um væntaðu rentulækkingarna.

Hóast óvissuna ið hevur valda seinastu tíðina, metir Kaupthing at grundarlag er fyri hækkandi partabrævakursum framyvir. Hetta tí fyritøkurnar vinna fitt av peningi og at tey grundleggjandi viðurskiftini fyri framhaldandi búskaparvøkstri eru góð.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1399,37 | + 2,06% |
| Alheims partabrøv | 8442,70 | + 1,36% |
| Atlantic Petroleum | 1108,00 | + 3,75% |
| Føroya Banki | 235,00 | + 3,98% |
| Eik Banki | 693,00 | + 0,14% |
| KB Trygg Eurostoxx | 108,86 | -0,11% |
| USD | 545,47 | -1,24% |
| JPY | 4,71 | -2,08% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

**Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo**

KAUPTHING BANK

# Søkir tú nýggjar leiðir?

## Lýsingarstovan Døgg søkir eftir grafikara

Døgg, sum er lýsingarstovan hjá SMS søkir eftir grafikara. Tú skalt helst vera útbúgvin grafikari, ella hava drúgvar royndir innan grafiskt virksemi. Og so slepst ikki uttan um kreativitet. Uppgávurnar eru fjølbroyttar og spennandi, og arbeiðistíðirnar eru góðar. So um tær dámar nýggjar avbjóðingar, í einum nýggjum umhvørvi, so er tað helst tær, vit hava brúk fyri.

Skunda tær og skriva eina umsókn til: SMS, att: Døgg, Box 1059, FO-110 Tórshavn ella send ein teldupost til ann-mari@sms.fo




Døgg